j.nr. 20070348

millum undirritaðu

**Føroyar Skipara- og Navigatørfelag**
**Yviri við Strond 3**
**100 Tórshavn**

og

**Fíggjarmálaráðið**
**Kvíggjartún 1**
**160 Argir**

er í dag gjørd henda

# *Semja*

*viðvíkjandi skiparum og yvirstýrimonnum, sum sigla við Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins*

Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag frá 14. mai 2002 gjørdust skiparar og stýrimenn, sum sigla við Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins tænastumenn.

Síðani sáttmálin varð inngingin hava partarnir verið ósamdir um, hvørt skiparar og stýrimenn, sum sigla við Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins hava rætt til frítíðarløn av yvirtíðararbeiði.

Føroya Skipara- og Navigatørfelag hevur tann 8 oktober 2010 úttikið stevning mótvegis Fíggjarmálaráðnum við kravi um, at ráðið verður dømt at viðurkenna, at skiparar og stýrimenn, sum sigla við Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins hava rætt til frítíðarløn av yvirtíðararbeiði.

Somuleiðis hava partarnir verið ósamdir um, hvørja lønarhækking skiparar og stýrimenn, sum sigla við Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins hava rætt til. Samráðingar vóru um hendan spurning í 2003, uttan at partarnir blivu samdir.

Føroyar Skipara- og Navigatørfelag hevur gjørt galdandi, at limir felagsins, sum sigla Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins ikki hava fingið somu lønarhækking, sum onnur á arbeiðsmarknaðinum fingu í oktober 2003.

Partarnir hava ført samráðingar um hesar ósemjur, og hava nú gjørt hesa semju:

1. Føroya Skipara- og Navigatørfelag tekur aftur stevningina mótvegis Fíggjarmálaráðnum í BS 1614/2010, og ber hvør partur sín kostnað í sambandi við hetta rættarmál.

2. Partarnir eru samdir um at gera hesar broytingar í verandi avtalu frá 14. maj 2002 millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Skipara- og Navigatørfelag fyri skiparar og stýrimenn, sum sigla sum tænastumenn umborð á Vaktar- og Bjargingarskipum Landsins:

**A.** §2, stk. 1, verður broytt soleiðis, at skiparar verða løntir í lønarflokki 36.
- yvirstýrimenn verða løntir í lønarflokki 32 og 33.
1. stýrimaður verður løntur í lønarflokki 30.

**B.** Skiparar og stýrimenn hava rætt til 12% í frítíðarløn fyri yvirtíðararbeiði.

**C.** Reglan í §4, stk. 5, verður eisini galdandi fyri skiparar.

**D.** Broytingarnar fáa gildi frá og við 1. apríl 2012 at rokna.

**E.** Partarnir eru samdir um hvørjar dagføringar skulu gerast í verandi avtalu frá 14. maj 2002 í sambandi við, at henda semja verður gjørd. Hjáløgd er dagførd avtala, sum verður undirskrivað samstundis sum semjan verður undirskrivað.

3. Møgulig krøv frá verandi ella fyrrverandi limum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, eisini teir sum eru farnir úr tænastu, eru Fíggjarmálaráðnum óviðkomandi.

Tórshavn, tann 22/6 2012

Føroya Skipara- og Navigatørfelag

Eyðstein Djurhuus, formaður

Fíggjarmálaráðið
Lønardeildin

Snorri Fjallsbak, stjóri